## Nærkast IM-norminum

Heini Olsen, úr Klaksvík, tók eitt týðandi fet á leiðini, at tilogna sær IM-heitið, tá hann í 5. umfari í Klaksvík International vann á Olafi Berg. Kravið hjá Heina er at fáa 5 stig í krútsterku kappingini. Eftir sigurin fyrrapartin í gjár eru 20,5 stig komin til høldar. Sigurin á Olafi –við svarta fólkinum - var sera sannførandi. Hinvegin varð Martin Poulsen av álvara settur uppá pláss av litavska stórmeistaranum GM Sarunas Sulskis, tá hann við svarta fólkinum royndi alternativar leiðir í sisilionsku spæliskipanini.



## Úrslitini í 5. umfari:

GM R. Åkesson – GM G. Jones 0,5-0,5
IM E. Lund – GM M. Grabarczyk 0,5-0,5
Olaf Berg – FM Heini Olsen 0-1
GM S. Sulskis – Martin Poulsen 1-0
FM D. Semcesen – T. Sammulvuo 0,5-0,5

Litava-Føroyar 1-0 (1-0):

# Orkaðu ikki at svara aftur

**Heiðurlig tap hevur føroyska liðið fingið nóg mikið av seinastu tíðina. Mikukvøldið kom enn eitt av slagnum, tá føroyingar ikki tóktust hava neyðuga yvirskotið til veruliga at svara aftur eftir litaviska leiðslumálið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Kaunas, Litava:** Fyrstu 20 minuttirnir vóru altavgerandi. Ein setningur, sum so ofta hevur veirð galdandi fyri føroyska fótbóltslandsliðið. Ikki minst tær tríggjar undanfarnu ferðirnar, sum føroyingar hava vitjað í Litava, og har trýstið móti føroyska málinum hevur verið sera stórt fyrsta stóra korterið ella so.

Og tað mundi gingið mikukvøldið. Vísarin var á veg runt fyri 20. ferð, tá avgerandi mistakið hendi. Fróði Benjaminsen satsaði nakað nógv, tá hann fór í litaviska liðskiparan, Tomas Danilevicius. Uttan stórvegis trupulleikar varð toftamaðurin kantaður burtur, og við einum vælplaseraðum skoti varð bólturin sendir út móti handara stólpa, har Jákup Mikkelsen ikki rakk honum.

### Einsamallur Holst

Hetta gjørdist einasta málið í einum dysti, sum enn eina ferð prógvaði, at tað er meira enn bara hart hjá føroyska fótbóltslandsliðnum at spæla dupultumfar í altjóða høpi.

Kanska satsaði Litava ikki so øgiliga nógv eftir málið, tí fyrst og fremst ráddi um at fáa stigini til høldar. Og hvør sum ein stríddust allir mans á føroyska liðnum fyrimyndarliga.

Men tað var støðugt við kensluni av, at neyðuga yvirskotið til at skapa enn eina heila ella hálva sensatión ikki var til staðar í sama mun, sum tað var á Tórsvølli mikudagin.

Í mun til tann dystin, so var útgangsstøðið heldur varnari hesaferð. Talan var um reina 4-5-1, har Christian Lamhauge Holst var sera einsamallur á toppinum og samstundis sera væl ansaður av eini litaviskari verju, sum helst hevði sæð gandakynstur hansara á Tórsvølli leygardagin.

Styrkin hjá Holst er tó fyrst og fremst at leita djúpt í vøllinum, og tí trívist hann best sum næsti áleyparin. Hugskotið mikukvøldið var púra greit, at kantarnir og ein av sentralu miðvallarunum skuldu vera skjótir at bjóða seg til, og í einstøkum førum eydnaðist hetta eisini. Ikki minst riggaði samanspælið væl upp ígjøgnum vinstru, har Símun Samuelsen var aftur, og einar tríggjar ferðir restaði bara neyvleikin í seinastu sendingini, áðrenn tað gjørdist heilt vandamikið.

### Stóðu væl

Í føroyska endanum var nógv trýst, men tað var nú ikki so ofta, at støðan gjørdist so øgiliga vandamikil. Fyrstu bjargingina mátti Jákup fremja, tá Fróði stútaði litaviskt innlegg móti egnum máli, og ta einu ferðina mátti Jákup vippa góðan stútara uppum.

Í aðrar mátar varð litaviska hóttanin aloftast avmarkað til langskot og deyðbóltsstøður, men til hetta seinna hevði føroyska liðið lisið sera væl uppá, og hóast talan mangan gjørdist um klumpspæl mitt fyri málið, so var føroyska konsentratiónin og skipanin í verjupartinum somikið góð, at talan sjáldan gjørdist um tær heilt stóru royndirnar. Og í flestu førum endaði alt við, at skjúttin varð somikið trýstur, at Jákup Mikkelsen fekk sær heilt góða venjing við longu málspørkunum niðan á vøllin.

### Yvirskotið restaði

Eftir steðgin varð talan eisini fyri tað nógva um somu myndina. Nakrar ferðir mátti Jákup vísa síni kynstir, og ta einu ferðina mundi fríspark sníkt seg innum, men aldursforsetin var sum køtturin á strikuni.

Litavisku áskoðarunum dámdu einki, at teirra lið alt meira fall aftur á vøllin, har bólturin støðugt varð koyrdur runt, uttan at tað heilt stóra hendi, og soleiðis var eitt føroyskt trýst eftir útjavningini væntandi sein-

## FAKTA um dystin

**Litava-Føroyar 1-0 (1-0)**
**1-0:** Tomas Danilevicius, 20.
**Litava:** Zydrunas KarceMarskas – Marius Stankeviciu, Andrius Skerch, Ignar Dedura, Vidas Alunderis – Linas Pilibaitis (Marius Zaliukas, 90), Audrici Kjanavicius (Mindaugas Kalonas, 59.), Deivids Semberas – Andrives Velicka (Robertas Poskus, 69.), Tomas Danilevicius, Jaklius Mikolunai
**Gult kort:** Linas Pilibaitis, 43.
**Á beinkinum uttan at koma inn:** Paulius Grybanskas, Mantas Savenas, Edgaras Jankauskas, Kestutu Ivajkevicius
**Føroyar:** Jákup Mikkelsen, Jónas Tór Næs, Egil á Bø, Jón Rói Jacobsen, Johan Troest Davidsen – Christian Høgni Jacobsen, Atli Danielsen, Bogi Løkin (Arnbjørn T. Hansen, 85.), Fróði Benjaminsen (Rógiv Jacobsen, 87.), Símun Samuelsen (Ingi Højsted, 81.) – Christian Lamhauge Holst
**Á beinkinum uttan at koma inn:** Andrew av Fløtum, Leif Niclasen, Gunnar Nielsen, Jann Ingi Petersen
**Gult kort:** Símun Samuelsen, 77.

